| | | |
|---|---|---|
| **LD-Vegleiðing** | Dato 16. juli 1999 | Ár-nr.**1999-7** |
| Til **Stovnar hjá landinum** | LD j. nr. 8420-00-2/99 | Síða |
| Heiti **Vegleiðing um flokkingar og umflokkingar.** | | |

# Innihald


Øki ..... 2
Inngangur ..... 2
Stovnsbygnaður ..... 2
Hugtøkini flokking, umflokking og starvslýsing ..... 3
  Flokking ..... 3
  Umflokking ..... 3
Starvslýsing ..... 3
  Nýggj størv ..... 3
  Munandi starvsbroyting ..... 3
Umsókn um flokking/umflokking. ..... 4
Fylgiskriv í sambandi við starvslýsingar ..... 5
Starvsheiti:_ ..... 5
Starvssamanseting ..... 5
Starvsøkið ..... 5
Leiðsluuppgávur ..... 6
  Útbúgving ..... 6
  Arbeiðsroyndir ..... 6
  Starvsbroyting ..... 6

**Øki**

Henda vegleiðing er galdandi fyri allar stovnar hjá tí almenna og sjálvsognarstovnar, sum Fíggjarmálastýrið hevur málsræði til at áseta lønar- og starvsfólkaviðurskiftini fyri.

**Inngangur**

Lønardeildin í Fíggjarmálastýrinum hevur seinastu tíðina merkt eina munandi øking av umsóknum frá stovnum og fakfeløgum um at flokka/umflokka nýggj ella verandi størv. Av tí innkomna tilfarinum, sum skal liggja til grund fyri málsviðgerðini av tílíkum umsóknum, sæst, at tørvur er á eini neyvari lýsing av, hvørji formlig krøv eru neyðug til hesa málsviðgerð.

Samstundis skal verða gjørt vart við, at sáttmálarnir innan tað almenna eru sokallaðir normallønarsáttmálar við einum lønarstiga, har fyrilit er tikið í fyribrigdinum starvsaldur, sum starvsfólk fáa, alt eftir, hvussu leingi viðkomandi hevur verið í starvi. Tað er sostatt ikki ætlanin, at ásetingarnar um umflokking/framflyting skulu nýtast til at veita lønarhækkingar oman á skalalønina.

Endamálið við hesum rundskrivi er tískil at vísa á, hvørji krøv Lønardeildin í Fíggjarmálastýrinum vil hava lýst nágreiniliga fyri at kunna gera eina samanbering av størvum innan almennu umsitingina, tá talan er um flokkan/umflokkan av størvum.

**Stovnsbygnaður**

Fyri at kunna gera hesar starvssammetingar er neyðugt, at gjørdur verður ein stovnsbygnaður fyri hvønn einstakan stovn.

Bygnaðurin skal m.a. greitt lýsa hvørjar uppgávur stovnurin hevur, hvussu ábyrgdar-/heimildarøkini eru býtt millum starvsfólkini og hvørji starvsfólkaheitini eru á stovninum, og hvussu hesi eru flokkað í løtuni.

Bygnaðurin skal eisini vísa talið á virkisøkjum á stovninum t.v.s, hvussu nógv av niðanfyri nevndu størvum stovnurin hevur:

Stjórar
varastjórar
deildarleiðarar
skrivstovufulltrúar
málsviðgerar
skrivstovufólk
lærlingar
húsavørðar
o.s.fr.

Umframt at hesin bygnaður skal vera góðkendur av stjóranum á stovninum, so er neyðugt, at avvarðandi aðalstýri staðfestir henda stovnsbygnað at vera galdandi.

Tá talan er um bygnaðarbroytingar, o.l. verður mint á , at flestu sáttmálar hava ásetingar, um at starvsfólkið skal takast við uppá ráð. Eisini verður mælt til at álitisfólkið verður kunnað, tá ið tilfarið verður sent til avvarðandi aðalstýri.

**Hugtøkini flokking, umflokking og starvslýsing**

## Flokking

Hugtakið *flokking* verður nýtt í sambandi við lønarásetingina fyri nýggj størv (lønarflokkur og møgulig viðbót).

Allar flokkingar skulu hava støði í bygnaðinum, sum gjørdur er fyri stovnin.

## Umflokking

Hugtakið *umflokking* verður nýtt í sambandi við broyting av løn fyri verandi størv. Umflokkingar kunnu vera av einstøkum starvi ella ávísum virkisøkjum.

**Starvslýsing**

Fyri hvørt virkisøki skal vera ein starvslýsing. Hesi viðurskifti eiga at verða nágreiniliga lýst í starvslýsingini:

- hvørji førleikakrøv t.d. útbúgvingarliga verða sett til at kunna røkja starvið
- tær týdningarmestu arbeiðsuppgávurnar
- tann ábyrgd, sum knýtir seg til starvið, herundir ein lýsing av ábyrgd í mun til tann næsta fyrisetta og næsta undir
- flokking av næsta fyrisetta og næsta undir
- um talan er um leiðarastarv, so skal vera greitt frá, hvussu nógv starvsfólk viðkomandi hevur beinleiðis ábyrgd av

## Nýggj størv

Tá ið starv verður skipað, verður tað vanliga sett aftaná, at tað hevur verið lýst alment.

Treytin fyri nýggjum starvi er at:

- talan er um heilt nýggjar uppgávur ella víðkan av verandi uppgávum, sum innihaldsliga gera, at starvið fær heilt annað innihald enn upprunaliga, og/ella tí, at bygnaðarligar broytingar á stovninum føra við sær, at eitt nýtt starvsøki verður skipað.

## Munandi starvsbroyting

Munandi starvsbroyting er at skilja sum, at starvsinnihaldið er grundleggjandi broytt samanborið við tær uppgávur, sum viðkomandi starv hevur havt.

Tílíkar broytingar kunnu koma fyri í sambandi við:

- broyting í innanhýsis arbeiðsgongd
- munandi fyriskipanarligar broytingar á stovninum
- broyting av samskipanar- ella leiðsluuppgávum
- økt ábyrgd av teimum uppgávum, sum higartil hava hoyrt til arbeiðið
- víðariútbúgving krevst fyri framhaldandi at kunna røkja starvið

Ein munandi starvsbroyting vil altíð vera knýtt at einum dagstevndum degi. Sum dømi

kann nevnast, at um so er, at ein løgtingslóg viðførir eina innanhýsis broyting í arbeiðsgongdini á stovninum soleiðis, at álagt verður t.d. skrivara at røkja málsviðgerðarauppgávur, so er hetta at skilja sum munandi starvsbroyting.

Um tað ikki kann ávísast, at starvsbroytingin er knýtt at einum dagstevndum degi, er talan um eina sokallaða *glíðandi gongd,* ið eigur at verða tikin upp í sambandi við sáttmálasamráðingar.

Møgulig ivamál viðvíkjandi hesari vegleiðing eiga at vera løgd fyri Fíggjarmálastýrið.

**Umsókn um flokking/umflokking.**

Umsókn um flokking/umflokking skal verða send til aðalstýrið, ið stovnurin hoyrir til. Heldur aðalstýrið grundarlag vera fyri umsókini, sendir aðalstýrið umsóknina og eitt tilmæli til Lønardeildina í Fíggjarmálastýrinum. Lønardeildin vil síðan viðgera umsóknina, og um neyðugt taka upp samband við avvarðandi fakfelag fyri at áseta endaligu flokkingina.

Viðmerkjast skal, at ein flokking ella umflokking vanliga tekur 3-6 mánaðir at avgreiða.

L.v.

Thomas Magnussen

**Fylgiskriv í sambandi við starvslýsingar**

Niðanfyri nevndu upplýsingar skulu útgreinast og vera tøkar, áðrenn Lønardeildin kann gera sambæriligar starvssammetingar í sambandi við flokkingar/umflokkingar.

**Starvsheiti:**_____________________________

| | |
|---|---|
| **Avgerðarmyndugleiki** | Hvørjar sjálvstøðugar avgerðarheimildir liggja til starvið |
| **Starvssamanseting** | Leiðsluuppgávur/málsviðgerðaruppgávur/starvsfólkauppgávur |
| **Starvsøkið** | Vavið á høvuðsstarvsuppgávuni |
| **Leiðsluuppgávur** | Á hvørjum leiðarastigi er starvið, og hvat fatar starvið um |
| **Útbúgving** | Hvør útbúgving krevst til starvið og hvussu long er útbúgvingartíðin |
| **Arbeiðsroyndir** | Neyðugar arbeiðsroyndir eftir lokna útbúgving fyri at kunna røkja starvið |
| **Starvsbroyting** | Um starvið er broytt innihaldsliga síðani tað upprunaliga var flokkað, so skal upplýsast:nær, hvussu og hví. |

**Avgerðarmyndugleiki**

Avgerðir verða tiknar á øllum starvsstigum, tað er bert sereyðkennini fyri avgerðunum, sum eru ymisk. Í hesum førinum er talan um tær avgerðir, sum eru lagdar til starvið og ikki avgerðir, sum frammanundan eru ásettar í reglum, rundskrivum og leiðbeiningum ella eru staðfestar í verandi praksis, sum tað bert er neyðugt at sláa upp í atkomuligum handbókum fyri at kunnu finna fram til avgerðina. Her verður sostatt bert hugt eftir, hvussu sermerktu avgerðareyðkennini eru, sum hoyra til starvið. Um so er, at endaliga stovnsavgerðin verður tann sama sum avgerðin hjá málsviðgeranum, er talan um serkøna tilráðing, og er tá at sammeta við sjálvstøðuga avgerð.

**Starvssamanseting**

Her verður mett um í hvussu stóran mun leiðsluuppgávur og aðrar vanligar arbeiðsuppgávur eru tengdar at starvinum. Dentur verður her lagdur á, hvussu nógva tíð starvið krevur til uppgávur, ið ikki fevna um leiðslu, sum verður mett fyri seg sjálvan undir lýsingini av leiðsluuppgávunum.

**Starvsøkið**

Her verður mett um, hvussu umfatandi høvuðs arbeiðsuppgávurnar eru í mun til alt starvið, og um tað til hesar arbeiðsuppgávur eru lagdar sjálvstøðugar avgerðarheimildir, tí mett verður, at tann setti skal kunna hava serkunnleika og servitan á økinum.

**Leiðsluuppgávur**

Her verða lýstar tær arbeiðsuppgávur - bert fyri tey størv á stovninum - sum beinleiðis hava við sjálva arbeiðsleiðsluna at gera, og sum eru undir ella ájavnt við viðkomandi leiðara. Harumframt skulu her bert lýsast tey størv, sum leiðslan hevur beinleiðis leiðsluábyrgd av.

Hesar upplýsingar verða síðani nýttar í viðgerðini og eru grundarlagið fyri flokkingini/umflokkingini.

## Útbúgving

Hvør útbúgving krevst fyri at kunna røkja starvið.

## Arbeiðsroyndir

Hvørjar verkligar royndir (førleiki) eru neyðugar fyri at kunna røkja starvið.

Saman við útbúgvingini eru verkligu royndirnar tann samlaði kunnleikin, sum er neyðugur fyri at kunna røkja starvið.

## Starvsbroyting

Starvsbroyting skal kunna vera knýtt at einum dagstevndum degi. Fyri at kunna lýsa hetta nærri er neyðugt at fáa upplýst nær, hvussu og hví starvsinnihaldið er broytt. Um tað ikki kann ávísast, at starvsbroytingin er knýtt at einum dagstevndum degi, er talanum eina sokallaða *glíðandi gongd,* sum er ein natúrlig fylgja av starvsmenningini.